# Vil hava politikararnar at fara í arbeiðshandskarnar

**Virði fyri millióna upphæddir fara fyri skeyti, tí at vit ikki fiska háv, sigur Egil Olsen á Livravirkinum á Eiði**

FISKATILFEINGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Politikararnar eiga nú at fara í arbeiðshandskarnar og gera tað, sum er neyðugt, fyri at gongd á beinleiðis fiskiskap eftir hávi.

Tað heldur Egil Olsen, stjóri í Faroe Marine Biotech.

Hann sigur, at av tí at vit ikki fiska háv, fara virði fyri milliónir fyri skeyti.

Og hann heldur tískil, at tað er óskiljandi, at politikararnir ikki gera nakað við hetta.

Tórbjørn Jacobsen og Heidi Petersen úr tjóðveldisflokkinum hava lagt uppskot fyri Løgtingið um at skip og bátar skulu hava skyldu til at taka livur og tað er hetta, sum gevur Egil Olsen høvi til at siga sína hugsan um málið, og tað hevur hann gjørt fyri vinnunevndini hjá løgtinginum.

Í blaðnum í gjár vísti Egil Olsen á, at hann tók undir við, at skip og bátar fingu skyldu at taka livur og hann mælti til, at tey, sum ikki gjørdu tað, skuldu missa fiskidagar.

Men hann heldur eisini, at vit eiga at gera, tað, vit kunnu, fyri at fáa gagnnýtt okkara fiskatilfeingi til fulnar og í hesum sambandi fýlist hann á, at politiski myndurgleikin onki ger fyri at fáa gongd á fiskiskapin eftir hávi.

Hann sigur, at bæði í fjør og í ár hevur vinnunevndin hjá Løgtinginum mælt Landsstýrismanninum í fiskivinnumálum til at fáa í gongd veruligan fiskiskap eftir hávi.

– Higartil hevur einki úrslit spurst burturúr, sjálvt um fleiri umsóknir liggja í FIskimálaráðnum um loyvi til at fara undir beinleiðis fiskiskap eftir hávi.

Hann sigur, at Fiskimálaráðið førir fram, at lógin forðar fyri hesum, men at tað hinvegin onki er í vegin fyri, at línuskipini fiska háv.

– Táið politiski viljin er at fáa í gongd veiðu eftir hávi, skuldi tað verið sjálvsagt at gjørt tær neyðugu lógarbroytingarnar, sum tóku forðingarnar burtur, sigur Egil Olsen.

Hann evur ikki nógv fyri grundgevingina hjá Fiskimálaráðnum um, at línuskipini kunnu fiska háv.

– Veruleikin er at einki línuskip hevur verið á beinleiðis hávaveiðu í eini tíggju ár og tað er ein veruleiki, vit mugu fyrihalda okkum til, sigur stjórin í Faroe Marine Biotech.

– At flyta veiðiorku frá troyttum stovnum til fiskiskap eftir hávi, sum als ikki er troyttur, átti at verið skilagóður politikkur. Eitt skip í beinleiðis veiði eftir hávi og sum fiskar 1500 tons um árið, hevði kunnað avreitt eini 4-500 tons av livur fyri einar fýra milliónir krónur. Harumframt kemur virðið á sjálvum hávinum.

– Tað er tí óskiljandi, at einki verður gjørt við hetta politiskt, sigur Egil Olsen.

– Vit fara tí staðiliga at heita á politiska myndugleikan at fara í arbeiðshandskarnar og gera tað, sum er neyðugt fyri at fáa gongd á beinleiðis fiskiskap eftir hávi, leggur hann afturat.



*– Tað er óskiljandi, at politikararnir ikki gera nakað fyri, at vit kunnu fara undir beinleiðis veiði eftir hávi, heldur Egil Olsen*

## Royna at styrkja fíggjarliga grundarlagið

**Í fjør tók livravirkið á Eiði ímóti 366 tonsum og í ár er gongdin tann sama, sigur Egil Olsen, stjóri. Hann mælir til at vit fara undir eina skipan, so at tað ber til at avreiða fiskin ókruvdan**

FISKATILFEINGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í fjør tók livravirkið á Eiði ímóti 366 tonsum. Størra nøgdin kom í tíðarskeiðnum oktober til desember, men tað er tí, at tað er mest livur í fiskinum er mest í hesum tíðarskeiðnum. Harumframt høvdu djúpvatnstrolarnir góðan fiskiskap eftir toski og har var so at siga øll livurin tikin, burtursæð frá trolarunum Roc Amadour, Sancy og Vesturvarða.

Tað hevur Egil Olsen, stjóri á livravirkinum upplýst fyri vinnunevndini hjá Løgtinginum, nú spurningurin er til viðgerðar um at skip og bátar skulu hava skyldu til at taka livur og rogn.

Av rávørunøgdini í 2005 stóðu djúpvatnstrolarnir fyri 85%, partrolarnir, Vestmenningur og Fram fyri 10%, garnabátar stóðu fyri 4% og aðrir fyri 1%.

Av partrolarunum hevur Vestmenningurskarað framúr og eigur meiri enn 70% av livranøgdini í hesum bólki. Eftir okkara tykki er orsøkin tann, at hugburðurin er positivur og her hava menn tikið livur frá upsa sum er hondkruvdur.

Fyrstu seks mánaðirnar í ár hevur virkið tikið ímóti 178 tonsum av livur. Myndin í 2006 er nøkulunda tann sama, burtursæð frá at trolbátar eru komnir við meira livur (15%). Tann lutfallsliga økingin hjá trolbátunum hevur minkað um partin hjá djúpvatnstrolarunum við 5% og við 10% hjá partrolarunum.



*Samfelagsbúskaparliga vildi tað verið skilagott at stuðla eini verkætlan, sum hevði til endamáls, at skip og bátar kundu avreitt fiskin ókruvdan, sigur Egil Olsen*

**Styrkja grundarlagið**

Annars hava tey á livravirkinum á Eiði arbeitt miðvíst fyri at betra fíggjarliga grundarlagið undir virkinum.

– Í hesum sambandi eru vit farin undir at bræða lýsi burturúr innvølum av sílum. Vit keypa sílainnvølir frá sláturvirkjum og bræða hetta til sílalýsi til útflutnings, sigur Egil Olsen.

Hann vísir á, at sláturvirkini hava verið noydd at gjalda fyri at sleppa av við sílannvølirnar, men nú fáa tey ein prís fyri innølirnar, sum sum tilsamans merkir ein positivan mun uppá umleið eina krónu.

Hann sigur, at skal eitt virki sum Faroe Marine Biotech, yvirliga, er sílalýsi eitt gott ískoyti.

Annas heldur hann, at skipanin við at taka innvøl úr sílum, átti at verið eitt gott hugskot fyri eisini at avreitt ókruvdan fisk so at hann ístaðin kann verða kruvdur á landi.

– Í Íslandi verða yvir 100.000 tons av fiski avreiddur ókruvdur. Hetta skapar meiri virksemi, lættir um arbeiðið umborð, umframt at virkir kunna fáa meirvirði burturúr innvølunum.

– Tí vildi tað verið samfelagsbúskaparliga skilagott at stuðla eini verkætlan.

# Bjørn Kalsø vil ikki gloppa dyrnar

**– Vit fara ikki at geva innflutningsloyvi til nýggj skip at fiska háv, hóast hávur næstan ikki verður fiskaður, sigur Bjørn Kalsø**

FISKATILFEINGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Geva vit innflutningsloyvi til skip at fiska háv, er skjótt at koma undir trýst fyri at geva skipunum kvotu av botnfiski eisini og tær dyrnar vil Bjørn Kalsø ikki gloppa. Hann sigur, at skipini, sum eru, kunnu fiska háv, er áhugi fyri tí*

- Vit fara ikki at geva innflutningsloyvi til fleiri skip at fiska háv.

Tað staðfestir Bjørn Kalsø, landsstýrismaður.

Hann fer tí ikki at ganga ynskinum frá Egil Olsen á møti í aðrari grein her á síðuni, har hann mælir politikarunum til at bera so í bandi, at tað hávurin verður gagnnýttur meiri.

Bjørn Kalsø sigur, at tað er onki, sum forðar fyri, at hávurin verður troyttur.

– Línuskipini, sum eru í flotanum, kunnu fiska háv. At tey so at kalla ikki troyta hendan møguleikan er ein annar spurningur, men tað má uttan iva vera tí at tað ikki loysir seg, sigur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum.

Hann staðfestir tí, at innflutningsloyvi verða ikki givin til fleiri skip, sum skulu fiska háv burturav, hóast umsóknir eru um tað.

– Tað verður ofta funnist at politiska myndugleikanum fyri at veiðitrýstið er ov stórt . Tí fara vit ikki at geva innflutningsloyvi til fleiri skip at fiska háv burturav, tí tá er altíð vandi fyri at koma undir trýst seinni at geva hesum skipum kvotur av botnfiski afturat, skuldi tað víst seg, at hávafiskurin ikki gekk sum ætlað.

- Tað kann í síðsta enda føra við sær, at hóast vit geva innflutningsloyvi til eitt skip at fiska háv burturav, kann tað enda við, at hetta sama skipið ikki verður ørðvísi enn eitt vanligt línuskip og so er veiðiorkan vaksin enn meir.

Og tær dyrnar vilja hann ikki gloppa

– Tí hava vit heldur lagt upp til, at tey skip, sum longu eru í flotanum, kunnu royna eftir hávi ávísar tíðir. Vit hava enntá gjørt eina kunngerð, sum sigur, at skip kunnu fáa fiskidagar afturfyri at royna eftir hávi og avreiða livrina.

Men hendan møguleikan hevur ongin bátur roynt enn.

Tí er tað ikki rætt, at vit forða fyri, at fiskiskapur kann taka seg upp eftir hávi.

– Vit geva ikki bara innflutningsloyvi til fleiri skip, tí vit hava nóg mikið av skipum, sum er. Bjørn Kalsø leggur afurat, at á hesum øki er neyðugt at verða støðufastur, tí flotin er nóg stórur sum er.

Annars sigur hann, at hann heldur at tað er skeivt at áleggja skipum og bátum at taka livur.

– Nú hava vit roynt at eggja teimum til at taka livur við at geva teimum eykafiskidagar afturfyri.

Hann sigur, at enn er so stutt fráliðið, at hann veit ikki um tað ber til at fella endaligan dóm yvir tað skipanina.

Men tað er rætt, at tað vísir seg, at teir bátar, sum hava nokk av døgum, eru trekari at taka livur.

Men vísir tað seg í longdini, at skipini ikki taka livur og stór virði fara fyri skeyti, vísir hann ikki tankanum frá sær beinleiðis at áleggja skipunum at taka livrina, men tað verður ikki við tað fyrsta.

– Besta motivatiónin er kortini at lata so góðan prís, at tað loysir seg at taka livur. Og nú vilja vit royna hesa skipanina í verki fyrst, áðrenn vit taka onnur stig, sigur Bjørn Kalsø.